## Strikaðu Árna út

Allir íslendingar eru eftir øllum at døma ikki so fegnir um, at fyrrverandi altingsmaðurin Árni Johnsen í Vestmannaoyggjunum slapp at stilla uppaftur, eftir at hann hevði sitið dóm fyri lógarbrot. Hann stillaði upp fyri sín gamla flokk, Sjálfstæðisflokkin, á valinum leygardagin, men tá upptalt varð, vísti tað seg, at 22 prosent av veljarunum hjá flokkinum høvdu strikað út yvir navn hansara á valevnislistanum. Árni varð kortini valdur.

## KST betri sømdir

Fær kunningar- og samskiftistøkni ella KST teir røttu karmarnar at virka innanfyri, kann hendan vinnugreinin gerast ein týðandi partur av føroysku vinnuni, sigur Michael Thomsen, formaður í KT-felagnum, við Útvarpið. Hann heldur, at vit eiga at stovna útbúgving og gransking innan KST longu í heyst og vísir á, at fólk, sum útbúgva seg innan KST uttanlands, koma ikki heimaftur, og tí er neyðugt at hava útbúgvingina í Føroyum.

# Fiskimenn stuðla arbeiðaru

**- Vit taka fult undir við, at tey, sum skapa virðini í vinnuni og lyftu samfelagið upp úr aftur kreppuni í nítiárunum, kunnu liva undir sømiligum korum. Reallønin hjá tímaløntum er ikki økt seinastu árini, og tí skilja vit væl, at arbeiðarafjøldin nú vil hava meira í lønarposan. Vit fara tó ikki at góðtaka, at útlendskar havnir verða boykottaðar fyri føroyskum landingum, men samstundis fara vit at heita á skipsmanningar um ikki at taka vørur heim við sær, sigur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag**

SAMHUGI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast eitt møguligt verkfall ella verkbann á arbeiðsmarknaðinum fer at føra við sær, at føroysk skip noyðast av landinum við fiskinum, er eingin ivi í hansara sál um, at fiskimenn eiga at stuðla arbeiðarunum í sínum stríði fyri betri korum.

- Tað er eingin ivi um, at vit geva arbeiðarunum okkara fulla stuðul, nú hesi stríðast fyri sínum rættindum, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard.

Í skrivandi løtu er ógjørligt at siga,

hvussu verður við trætuni á privata arbeiðsmarknaðinum, men er eingin loysn fingin á midnátt í kvøld, og samráðingarnar millum partarnar tá eru slitnaðar, hava vit antin verkfall ella verkbann.

**Einki boykott**

Formaðurin í Fiskimannafelagnum sigur, at sjálvandi verður tað meira stríð hjá fiskimonnum at sleppa av við fiskin, um vit fáa eitt verkfall, men hetta er ein støða, sum fiskimenn noyðast at liva við, so leingi sáttmálaloysi er.

- Neyðugt verður hjá manningunum at sigla av landinum við fiskinum, túrarnir verða longri, og ivasamt er, hvussu hetta fer at loysa seg, um nógvur fiskur kemur á marknaðin í senn.

Jan Højgaard vísir á, at áður hava føroysku arbeiðarafeløgini tosað um at boykottað útlendskar havnir fyri føroyskum landingum, men slík stig vónar hann kortini kki, at feløgini í einum møguligum verkfalli fara at taka.

- Eg fari inniliga at heita á allar skipsmanningar um ikki at taka vørur heim við sær til Føroya úr útlandinum, tí slíkt kann geva orsøk til boykott.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum væntar ikki, at feløgini hjá arbeiðarum á landi og fiskimonnum á sjónum fara at stríðast, nú tað ræður um at standa saman.



**At samstarva**

- Vegurin fram er samstarv millum feløgini, sum umboða arbeiðarastættina, og tí ivist eg onga løtu í, at vit fara at finna út av hesum í sátt og semju.

Hann heldur, at skuldi okkurt tikið seg upp, sum ósemja kann standast av undir einum verkfalli, mugu feløgini tosa saman og loysa málini til gagns fyri partarnar.

- Vit hava so mikið gott samstarv við arbeiðarafeløgini, at eg beri ongan ótta fyri stríði, um partarnir stuðla hvørjum øðrum og ikki mótarbeiða hvørjum øðrum, sigur Jan.

Spurdur, um tað kann hugsast, at fiskimenn fara í samhugaverkfall við arbeiðarafeløgini, um eitt møguligt verkfall verður langdrigið, sigur hann:

- Tað dugi eg ikki at meta um, men skuldi slíkt komið upp á tal, haldi eg, at ein tílík avgerð bert kann takast í samráð við limirnar hjá okkum – og ikki felagsstjórnini einsamallari.

Jan Højgaard sigur, at ein slíkur møguleiki slett ikki er umrøddur í felagnum.

**Felags Samtak**

Fyrst í nítiárunum stóðu Føroya Fiskimannafelag og Føroya Arbeiðarafelag saman um útgávuna av FF-blaðnum, men av ymiskum orsøkum datt samstarvið niðurfyri.

Nú eru so feløgini aftur saman um ein portal, Samtak.

Vit spurdu tí formannin í Fiskimannafelagnum, um hann væntar, at hesum samstarvi verður lív lagað, nú arbeiðarafeløgini kanska fara í verkfall, samstundis sum skipamanningarnar noyðast av landinum við fiskinum.

- Eg vænti ikki, at eitt møguligt verkfall fer at máa grundarlagið undan hesum samstarvi. Sum feløg, ið umboða sjófólk og arbeiðsfólk, verða vit kanska ikki samd í øllum, men stríð um smáting kunnu vit eftir mínum tykki ikki brúka til nakað. Vegurin fram er samstarv millum fakfeløgini, leggur Jan dent á.




*- Føroyski arbeiðarin er so langt afturút sigldur lønarliga, at myndugleikarnir áttu at tikið hædd fyri, at hesin samfelagsbólkur ikki gerst "annað klassa borgarar", sum Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, tekur til*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Línuflotin**

Hann heldur, at tann skipabólkur, sum kanska verður harðast raktur av einum møguligum verkfalli, er línuflotin, ið hevur vánaligan fiskiskap undir Føroyum í løtuni.

- Túrarnir hjá hesum skipum hava verið so smáir í seinastuni, at ivasamt er, um tað yvirhøvur loysir seg

*»Hvørjum hava vit meira brúk fyri – teimum, sum bera í landskassan ella teimum, sum taka úr honum«?*
*(Jan Højgaard)*